Sambandsflokkurin
Á Fólkatingi



# Føroyar á geopolitiska heimskortið

**Uttanríkis- og verjupolitiskar avbjóðingar og loysnir**

# Innihaldsyvirlit


Fororð 1

Søguliga politiska menningin 2

Tíðin búgvin til modernisering 3

Løgfrøðiligir karmar fyri føroyskan uttanríkispolitikk 4

Heimastýrislógin 4
Uttanríkispolitiska heimildarlógin 4
Stýrisskipanarlógin 5
Case: Arktiski Kapacitetspakkin 5
Lov om Det Udenrigspolitiske Nævn 6

Hvørjar eru avbjóðingarnar? 7

Uttanríkispolitiskt rásarúm 8
Tá avgerðir skulu takast 8
Viðgerðarkarmar fyri støðutakan 9

Hvørjar eru loysnirnar? 10

Størri uttanríkispolitiskt rásarum 10
Búgvið avgerðargrundarlag 11
Dagførdir viðgerðarkarmar 11

Samanumtøka 12

Keldur 14



# Fororð

Heimurin broytist, og heimurin mennist. Vit síggja tað alla tíðina - tøkniliga, mentanarliga, málsliga og politiskt.

Tey fleiri enn 30 árini, eg havi verið virkin í føroyskum og donskum politikki havi eg upplivað, hvussu skjótt hendan menningin kann ganga, og hvussu hon stundum eisini kann taka okkum á bóli.

Vit eru við øðrum orðum ikki altíð fyrireikað upp á tær avbjóðingar og avleiðingar, heimsmenningin hevur við sær. Hetta hava vit í Føroyum sæð og merkt seinastu árini, nú allur heimurin vil hava sín part í Arktis. Føroyar liggja mitt á motorvegnum í siglingarleiðini til Arktis, og upp á fá ár eru vit farin frá at verða nakrar smáar oyggjar í Norðuratlantshavi, sum eingin hevur givið sær stórvegis far um, til at verða eitt strategiskt mittpunkt, ið øll stórveldini eru áhugað í.

Hendan nýggja støðan setur nýggj krøv til Føroyar. Danmark hevur yvirorðnaðu ábyrgdina av uttanríkis- og verjupolitikki í øllum ríkinum, tískil eru flestar uttanríkis- og verjupolitiskar avgerðir tiknar í Danmark. Men Ríkisfelagsskapurin mennist eisini. Føroyar hava við tíðini fingið eitt størri uttanríkispolitiskt rásarúm og verða tiknar við í avgerðir, ið skulu takast um Føroyar, og eisini verður væntað av okkum, at vit taka egnar avgerðir í uttanríkis- og verjupolitiskum málum. Tað er her, trupulleikin stingur seg upp.

Í Føroyum er ikki siðvenja fyri at taka slíkar avgerðir, og politiska skipanin er tískil heldur ikki "gearað" til tað. Føroyar hava so at siga ikki ment seg nóg mikið á hesum øki. Men nú eru vit komin til eitt vegamót, har broytingar mugu til fyri at geva Føroyum eitt sjónligt, uttanríkispolitiskt andlit og fyri at geva okkum røttu amboðini til at taka slíkar avgerðir á ein rættan, demokratiskan hátt.

Við hesum uppriti, sum skrivstovan hjá Sambandsflokkinum á Fólkatingi hevur gjørt, verður víst á nakrar av teimum avbjóðingunum, ið eru í hesi menningini, og eisini verður víst á, hvussu hesar avbjóðingar kunnu loysast.

Tað er ein sannroynd, at Føroyar ikki verða minni týdningarmiklar framyvir. Vit mugu brynja okkum til framtíðina, og besta staðið at byrja er eftir mínum tykki í politisku skipanini.

Góðan lesihug.





# Søguliga politiska menningin

Føroyar hava, sum heild, bæði víðar karmar og góðar fortreytir innan Ríkisfelagsskapin. Hóast hetta, so hevur samfelagsliga menningin í Føroyum og í útheiminum áður havt við sær, at neyðugt hevur verið við tillagingum av ríkisrættarligu støðu Føroya. Hetta upprit er ein ásannan av, at enn einaferð er tørvur á at modernisera Ríkisfelagsskapin, serliga hvørjum viðvíkir uttanríkis- og verjupolitikki. Ein søgulig frágreiðing um júst hetta kann hóskandi hava útgangsstøði í, hvussu Føroyar á fleiri hættir altíð hava verið ein serstakur partur av Ríkisfelagsskapinum.

Stórpolitiskar altjóða hendingar hava fleiri ferðir verið avgerandi fyri støðu Føroya. Í 1814, aftaná friðin í Kiel, varð staðfest, at Føroyar gjørdust partur av Ríkisfelagsskapinum undir donsku trúnuni og hava verið tað síðani[1]. Tó so eru fleiri orsøkir til, at Føroyar á nógvar hættir hava verið eitt heilt serligt frábrigdi samanborið við aðrar partar av Ríkinum.

Danska kongaríkið fevndi upprunaliga um Føroyar, Grønland og eisini Ísland. Eitt, sum serliga hevur eyðmerkt støðu Føroya, er, at hóast vit eru partur av Ríkinum, so hava vit havt lutfalsliga stórt sjálvræði og sjálvstýring[2]. Millum mongu orsøkirnar teljast søgulig samfelagsviðurskifti og eisini landafrøðilig viðurskifti. Afturat hesum er nógv, sum bendir á, at Føroyar ikki vóru áhugaverdar fyri Danmark samanborið við Grønland, har treytir og avmarkingar frá donsku stjórnini forðaðu fyri egnari grønlendskari menning.

Sostatt hava umstøðurnar frá byrjanini verið soleiðis, at Føroyar sjálvar hava kunnað ment seg við egnum sereyðkennum sum land og fólk innan fyri Ríkisfelagsskapin.

Seint í fyrru helvt av 20. øld høvdu altjóða stríðsmál enn einaferð avgerandi týdning fyri støðu Føroya í Ríkisfelagsskapinum. 2. Veraldarbardagi hevði við sær ta fyri Føroyar kollveltandi broyting, at Danmark bleiv hersett av Týsklandi og Føroyar av Bretlandi, og sambandið millum ríkispartarnar hvarv. Undir bretsku hersetingini fóru føroyingar í størri mun enn áður at virka út frá egnum fortreytum og at skipa politikk og virksemi eftir egnari ætlan. Føroyingar høvdu havt víðkaðar heimildir og ræðisrætt undir krígnum, og tað ynsktu teir ikki geva frá sær, tá kríggið var av.

[1] (Sølvará, H.A., 2020), s. 4
[2] (Sølvará, H.A., 2020), s. 11-12, 31-32 & (Sølvará, H.A., 2002), s. 79, 285, 292

Føroyska stjórnin fór tí til samráðingar við donsku stjórnina um eina nýggja stjórnarskipan. Hetta stjórnarskipanaruppskot varð koyrt til fólkaatkvøðu, har føroyingar atkvøddu ímóti. Val varð tískil útskrivað, og nýggja stjórnin í Føroyum fór enn einaferð til samráðingar við donsku stjórnina. Úrslitið gjørdist Heimastýrislógin.

Heimastýrislógin varð sett í gildi í 1948, og hon gav Føroyum víðkaðar karmar innan Ríkisfelagsskapin, samstundis sum hon staðfesti sjálvsavgerðarrætt Føroya innan ávís málsøki. Í stuttum hevur heimastýrislógin verið politiska og løgfrøðiliga grundarlagið undir tí stóru menning og framburði, sum er farin fram í Føroyum í yvir 70 ár. Hon tryggjaði, at Føroyar, innan fyri víðu karmar Ríkisfelagsskapsins, stigvíst kundu menna seg til tað sjálvbjargna vælferðarsamfelagið, ið vit kenna í dag.

Ítøkiliga heimildaði heimastýrislógin føroyingum lóggevandi og fyrisitingarligan myndugleika av yvirtiknum málsøkjum, og hartil ásetti heimastýrislógin rammurnar fyri møguligum framtíðar yvirtøkum av málsøkjum. Samstundis ásetti heimastýrislógin, at m.a. uttanríkis- og verjupolitikkur skuldu vera verandi ríkisins felagsmál. Tann heimildin, ið heimastýrislógin gav Føroyum í uttanríkispolitiskum samanhangi, var møguleikin at ganga inn í altjóða sáttmálar.

Hóast hesa heimild skuldu altjóða sáttmálar gerast í samráð við umboð frá donsku stjórnini, og tí kundi hendan tilgongdin gerast heldur stirvin. Í 2005 bøttu Føroyar um støðuna, tá uttanríkispolitiska heimildarlógin bleiv samtykt. Við henni fingu Føroyar sjálvar heimild at føra uttanríkispolitikk á yvirtiknum málsøkjum, uttan at donsk umboð skuldu geva loyvi ella verða við til samráðingarnar. Hóast hesar víðkaðu uttanríkispolitisku heimildir fingu hvørki Løgtingið ella Landsstýrið sum so ávirkan á verjupolitikk Ríkisfelagsskapsins – heldur ikki, tá ið tað beinleiðis viðvíkti Føroyum.

## Tíðin búgvin til modernisering

Økta sjálvræðið og stýringin, sum er tillutað Føroyum við tíðini, hevur mest verið avmarkað til innanlands viðurskifti og handilspolitikk. Tað ber eisini til at siga, at í friðartíðini, sum hevur valdað í vesturheiminum eftir 1989, tá múrurin fall, so hava uttanríkis- og verjupolitisk viðurskifti, sum viðvíkja Føroyum, ikki altíð ligið ovarliga á dagsskránni hjá landsins politikarum.

Soleiðis, sum landsins myndugleikar, miðlar og fólk hvukku við fimm ár aftaná, at møguligi tørvurin á einum eftirlitsradara í Føroyum varð staðfestur[3], vísir, at land og fólk sum heild ikki hava givið sær stórvegis far um uttanríkis- og verjupolitisku viðurskifti Føroya.

Málið um Arktiska Kapacitetspakkan og stríðið, tað elvdi til, verður lýst nærri á síðu 5.

Økti spenningurin í Arktis hevur ført við sær, at Føroyar hava ein týðandi leiklut í verjupolitiskum høpi. Tískil eiga Føroyar sjálvsagt eisini at verða ein týðandi leikari í at skapa rammur og verjupolitikk. Samstarvsráðið, ið varð stovnað á sumri 2021, millum donsku, føroysku og grønlendsku stjórnirnar er eitt umráðandi fyrsta fet á hesi leið, tí tað tryggjar samstarv á stjórnarstigi millum londini[4].

Søguliga sæst, at ein líðandi menning hevur verið av tilgongdini hjá Føroyum og samstarvinum í Ríkisfelagsskapinum, hvørjum viðvíkir uttanríkispolitikki.

---

[3]Forsvarsministeriets fremtidige opgaveløsning i Arktis (2016):
https://www.ft.dk/samling/20151/almdel/FOU/bilag/151/1650324.pdf?fbclid=IwAR0FYACXE3a8AYjF6-TVREQX1y-rmyFM_q9vZdfiVm5dDBrKpwh7HgmufJRc (s. 69 & 163)
[4]Kommissorium for Udenrigs-, Sikkerheds- og Forsvarspolitisk Kontaktudvalg mellem Danmarks regering, Færøernes landsstyre og Grønlands Naalakkersuisut:
kommissorium-for-usfp-kontaktudvalg.pdf (stm.dk)

# Løgfrøðiligir karmar fyri føroyskan uttanríkispolitikk

Í fylgjandi parti verður greitt frá, hvørjar tær viðkomandi løgfrøðiligu heimildirnar og reglurnar eru, tá ið Føroyar skulu føra uttanríkispolitikk.

Innleiðandi skal nevnast, at Grundlógin er galdandi fyri alt Ríkið og er yvirskipaði karmurin fyri føroysku lógarheimildirnar, tó við teimum atlitum, sum m.a. heimastýrislógin, stýrisskipanarlógin og uttanríkispolitiska heimildarlógin áseta.

## Heimastýrislógin

Heimastýrislógin var upprunaliga heimild fyri Føroyar at føra uttanríkispolitikk og var galdandi fyri viðurskifti millum Føroyar og útheimin. Her stendur skrivað í §5 stk. 2 av Heimastýrislógini, at: Ríkisvaldið hevur avgerðarrættin í spurningum, sum viðvíkja ríkisins viðurskiftum við útheimin[5]. Hetta skal skiljast soleiðis, at Danmark hevði endaligu avgerðina í uttanríkispolitiskum spurningum.

Føroyar hava ikki lógarheimild at løggeva í málum viðvíkjandi trygdar- og verjupolitikki.

## Uttanríkispolitiska heimildarlógin

Uttanríkispolitiska heimildarlógin víðkar um møguleikan hjá Føroyum at føra sjálvstøðugan uttanríkispolitikk. Hetta sæst m.a. aftur í, at tað ikki longur er krav ella ein treyt, at danska uttanríkistænastan skal luttaka á fundum, ið snúgva seg um uttanríkispolitisk mál. Grundað uttanríkispolitisku heimildarlógina er tað heldur ikki neyðugt at umbiða fulltrú úr Danmark fyri at gera sáttmálar við onnur lond ella innganga í millumtjóðasáttmálar, tá tað viðvíkir málsøkjum, sum eru til fulnar yvirtikin smb. §1, stk. 1[6].

Harumframt kunnu Føroyar gerast limir í millumtjóðafelagsskapum, sum loyva øðrum eindum enn ríkjum, tó skal Danmark lata inn umsóknina vegna Føroyar, smb. §4[7].

Uttanríkispolitiska heimildarlógin kann sigast at vera karmurin fyri uttanríkipolitiska samstarv Føroya.

[5]Heimastýrislógin:
https://logir.fo/Kunngerd/11-af-31-03-1948-af-Lov-om-Faeroernes-Hjemmestyre
[6]Uttanríkispolitiska heimildarlógin:
https://logir.fo/Logtingslog/80-fra-14-05-2005-um-altjodaraettarligu-sattmalar-Foroya-landsstyris-at-gera
[7]Uttanríkispolitiska heimildarlógin:
https://logir.fo/Logtingslog/80-fra-14-05-2005-um-altjodaraettarligu-sattmalar-Foroya-landsstyris-at-gera



## Stýrisskipanarlógin

Hvørjum viðvíkir beinleiðis mannagongdum, tá avgerðir verða tiknar í landsstýrinum um uttanlandsviðurskifti, er tað stýrisskipanarlógini, vit skulu hyggja eftir.

Í §54 í stýrisskipanarlógini stendur, at: Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðførir seg við, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning[8]. Hetta merkir, at um tað skulu takast avgerðir, ið kunnu sigast at vera av stórum uttanlandspolitiskum týdningi, so skal Uttanlandsnevndin, sum er ein nevnd við sjey limum og er vald av løgtinginum, verða tikin við í avgerðina. Hetta merkir ikki, at Uttanlandsnevndin kann binda landsstýrismannin, men heldur, at tað er kravt av landsstýrismanninum, at hann kunnar og ráðførir seg við Uttanlandsnevndina.

§54 stk. 2 í stýrisskipanarlógini sigur víðari, at henda sama mannagongdin skal vera, tá ið samráðingar eru við ríkismyndugleikarnar um mál, ið hava stóran týdning fyri viðurskiftini Danmarkar og Føroya millum[9].

## Case: Arktiski Kapacitetspakkin

Arktiski Kapacitetspakkin bleiv avtalaður á Fólkatingi í februar 2021. Í avtaluni um Kapacitetspakkan stóð m.a., at ein eftirlitsradari átti at verðið uppsetur í Føroyum. Tó gjørdi verjumálaráðharrin greitt, at treytin fyri uppsetanina í Føroyum var, at føroyingar góðtóku hana. Sostatt fóru føroyingar í holt við at viðgera málið um radaran – viðgerðin av málinum hevur verið sera drúgv.

Viðgerðin hjá føroyingum av radaramálinum hevur ivaleyst víst seg at verið trupul, og serliga hevur politiska skipanin víst seg at vera óbúgvin til viðgerð av slíkum málum. Uttanlandsnevndin er ikki gearað at taka slíkar avgerðir, tí tað ikki hevur verið siðvenja fyri tí. Samstundis hevur kjakið um radaramálið borið við sær eitt krav frá summum politiskum flokkum um eina almenna viðgerð í løgtinginum av málinum – hetta er ikki siðvenja fyri mál, ið hava nógvar trúnaðarligar upplýsingar. Hesin trupulleikin hevði verið loystur, um Uttanlandsnevndin hevði verið umboðað eftir lutfalstalinum í løgtinginum.

[8]Stýrisskipanarlógin: https://www.logting.fo/um-logtingid/hvussu-arbeidir-tingid/styrisskipanarlogin/
[9]Stýrisskipanarlógin: https://www.logting.fo/um-logtingid/hvussu-arbeidir-tingid/styrisskipanarlogin/



## Lov om Det Udenrigspolitiske Nævn

Til samanberingar við føroysku stýrisskipanarlógina kann nevnast danska lógin "Lov om Det Udenrigspolitiske Nævn" ella UPN-lógin, tá ið tað snýr seg um uttanríkispolitisk viðurskifti. Hon sigur, á sama hátt sum stýrisskipanarlógin, at danska stjórnin skal ráðføra seg við donsku uttanlandsnevndina, kallað Udenrigspolitisk Nævn (UPN), um viðurskifti av stórum uttanríkispolitiskum týdningi. Umframt hetta skal danska stjórnin umrøða og kunna UPN um mál av uttanríkispolitiskum týdningi[10] - hetta ásetur stýrisskipanarlógin ikki fyri føroysku uttanlandsnevndina.

Ein annar munur millum stýrisskipanarlógina og UPN-lógina, er valið av limum. Sambært stýrisskipanarlógini skulu sjey umboð veljast úr løgtinginum, meðan UPN-lógin §1 sigur, at teir 17 limirnir úr fólkatinginum skulu vera valdir "efter forholdstal"[11]. Hetta merkir, at UPN verður beinleiðis umboðað eftir lutfallinum í fólkatinginum og soleiðis tryggjar grundfestan uttanríkispolitikk. Hesa treyt hava vit ikki eftir stýrisskipanarlógini, men nevnt verður í §20, at løgtingið velur limir í nevndir við lutfalsvali[12].

Munurin er sostatt, at í Føroyum innganga allar nevndirnar í sama lutfalsval, samstundis sum man ikki velur uttanlandsnevndina eftir lutfalstali, meðan tað í Danmark er eitt krav, at UPN er vald eftir lutfalstali.

Orsøkin til hendan munin kann hugsast at vera, at Uttanlandsnevndin upprunaliga skuldi viðgera handilsavtalur og millumtjóðasáttmálar, sum breið semja oftast var um, og virkaði annars í so máta sum hinar nevndirnar, eitt nú við at viðgera uppskot løgd fyri løgtingið, hóast sína serstøðu.

Sambært Grundlógini, so skal UPN setast, og stjórnin skal ráðføra seg við hana um viðurskifti av stórum uttanríkispolitiskum týdningi, smb. Grl. §19, stk. 3[13]. Sostatt er tað í stríð við Grundlógina, um danska stjórnin ikki ráðførir seg við UPN. Tað sama kann sigast at vera galdandi í Føroyum, tí um landsstýrið ikki ráðførir seg við Uttanlandsnevndina um mál av stórum uttanlandspolitiskum týdningi, harumframt stórmál Danmarkar og Føroya millum, so handlar landsstýrið í stríð við stýrisskipanarlógina, §54, stk. 1 og 2.

[10]UPN-lógin §2: https://www.retsinformation.dk/eli/accn/A19540005430
[11]UPN-lógin: https://www.retsinformation.dk/eli/accn/A19540005430
[12]Stýrisskipanarlógin: https://www.logting.fo/um-logtingid/hvussu-arbeidir-tingid/styrisskipanarlogin/
[13]Grundlógin: https://www.retsinformation.dk/eli/lta/1953/169

# Hvørjar eru avbjóðingarnar?

Samstundis sum Føroyar hava ment seg til eitt modernað vælferðarsamfelag við eini serstakari søgu, mentan og máli, hava vit eisini ment okkara støðu í Ríkisfelagsskapinum.

Fyrru partarnir í uppritinum lýsa hesa søguligu gongd, har Føroyar hava fingið alsamt meira uttanríkispolitiska heimild. Søgan prógvar, at vit innan Grundlógarinnar karmar hava ment okkum til at fáa alsamt størri ávirkan í altjóða høpi. Fyrru partarnir lýsa eisini, hvussu lógarkarmanir eru broyttir gjøgnum árini, til at Føroyar í dag virka undir fleiri lógum, ið geva okkum uttanríkispolitiskar heimildir, men somuleiðis eisini avmarkingar. Eisini er staðfest í 3. parti, at aðrir manglandi lógarkarmar høvdu styrkt okkara uttanríkispolitisku støðutakan.

Men áðrenn vit veruliga kunnu gagnnýta okkara støðu sum ein partur av Ríkisfelagsskapinum, tá tað kemur til uttanríkis- og verjupolitikk, eru nakrar avbjóðingar, ið skulu loysast. Avbjóðingar, ið stinga seg upp, tí heimurin og altjóða politikkurin broytist. Tað er ein sannroynd, at Føroyar, Grønland og Danmark hava eina sterkari, altjóða rødd saman, enn vit hava hvør sær.

Hesar avbjóðingar verða lýstar í hesum partinum av uppritinum.

Síðani Føroyar gjørdust partur av Ríkinum hava vit ment okkum, bæði sum eitt modernað vælferðarsamfelag og í mun til okkara uttanríkispolitisku heimildir. Føroyar hava í dag ein virknan leiklut á altjóða pallinum, tað veri seg í mun til handilsavtalur, atlimaskap í ymiskum altjóða felagsskapum og sum diplomatiskir vinir.

Men hvat er broytt, og hví hava vit í dag avbjóðingar, sum fyrr ikki hava verið ein trupulleiki?

Seinastu 20 árini er heimurin broyttur nógv. Globaliseringin hevur ført við sær, at heimurin er vorðin minni, og vit gerast alt annað líka meira bundin at okkara sambondum út í heim. Í hesi heimsmenning eru Føroyar vorðnar meira áhugaverdar fyri stórveldini úti í heimi, til dømis fyri USA, Kina og Russlandi. Hendan nýggja støðan setur Føroyar í eina tvístøðu. Eru Føroyar partur av vesturheiminum, sum vit í stóran mun sameina okkum við, ella eru Føroyar ein partur av eysturheiminum, sum vit í stóran mun handla við? Skulu vit velja millum eystur og vestur, ella skulu vit als ikki taka støðu og standa uttanveltað?

## Uttanríkispolitiskt rásarum

Føroyar, Grønland og Danmark hava ikki somu áhugamál í øllum uttanríkispolitiskum viðurskiftum, t.d. í Arktis. Fyri at kunna verja okkara áhugamál, eitt nú í Arktis, krevur tað, at Føroyar í størri mun fáa eitt uttanríkispolitiskt rásarúm, tá tað bara viðvíkir okkum.

Somuleiðis hava vit eisini tørv á at kunna umboða okkum sjálvi í summum altjóða felagsskapum. Hetta er ein møguleiki í dag sambært uttanríkispolitisku heimildarlógini, har tað er ásett í §4, at: "kann Danmarkar stjórn samtykkja at lata inn umsókn um limaskap Føroya, ella stuðla slíkari"[14]. Tó hevði tað verið ynskiligt, at ein og hvør møguligur altjóða limaskapur ella atlimaskapur kundi verið samráddur millum Føroyar og avvarandi felagsskap uttan um Danmark. Hetta hevði gjørt tilgongdina smidligari.

**1**

**Tí er fyrsta avbjóðingin:**
Manglandi heimild í uttanríkispolitisku heimildarlógini, sum gevur Føroyum størri uttanríkispolitiskt rásarúm, tá tað einans viðvíkir Føroyum.

## Tá avgerðir skulu takast

Tá tríggir partar av einum ríki saman føra uttanríkispolitikk, kann tað vera trupult at samantvinna hann til eitt samlað output. Hetta, tí at áhugamálini, sum áður nevnt, kunnu vera ymisk, og tí at yvirvaldsrætturin í seinasta enda er í Danmark, smb. Grundlógini. Men sæð í ljósinum av tí støðu, sum Ríkið er komið í, er tó ein stórur áhugi frá danskari síðu um, at Føroyar og Grønland fáa ein virknari uttanríkis- og verjupolitiskan leiklut.

Danmark hevur ein stóran áhuga í, at Ríkið verður varðveitt – og tað hava vit eisini. Vandin fyri, at Ríkið kann fara sundur í partar, er í dag størri enn nakrantíð, av tí at Føroyar og Grønland eru komin á geopolitiska heimskortið.

Eitt samstarvsráð varð stovnað í 2021, har stjórnirnar í Føroyum, Grønlandi og Danmark samskipa og kunna tvørturum ríkispartarnar um tann uttanríkispolitikkin, sum er settur út í kortið. Hetta er eitt stórt og jaligt stig á vegnum, men samstundis er eisini tørvur á, at avgerðirnar verða meira rótfestar í øllum pørtum av ríkinum, sum eitt nú við Arktiska Kapacitetspakkanum. Harafturat skal tryggjast, at føroysku myndugleikarnir eru við í allari tilgongdini, tá uttanríkis- og verjupolitikkur verður settur út í kortið.

**2**

**Tí er onnur avbjóðingin:**
Føroyskir myndugleikar verða ikki fult, og nóg tíðliga, tiknir við í uttanríkis- og verjupolitiskar avgerðir.

---

[14] Uttanríkispolitiska heimildarlógin:
https://logir.fo/Logtingslog/80-fra-14-05-2005-um-altjodaraettarligu-sattmalar-Foroya-landsstyris-at-gera



## Viðgerðarkarmar fyri støðutakan

Føroyar hava ikki siðvenju at føra uttanríkispolitikk, sum ikki er handils- og fiskivinnupolitikkur. Av somu orsøk hevur uttanríkis- og verjupolitikkur heldur ikki fylt nógv innanlendis, hvørki í politisku skipanini ella hjá vanliga føroyinginum. Sæð í einum tíðarperspektivi kann man tískil siga, at Føroyar eru "aftanfyri" ella óbúnar, tá tað kemur til uttanríkispolitiskan hugburð. Nýggja geopolitiska støðan hjá Føroyum merkir, at vit eru noydd at taka avgerðir, ið vit ikki áður hava skulað tikið støðu til.

Men nú er tíðin búgvin. Hetta víðkaða rásarúmið hevur sjálvsagt við sær, at Føroyar taka sín part av ábyrgdini og ikki minst taka nakrar uttanríkis- og verjupolitiskar búnar avgerðir. Men vit noyðast at finna eina loysn upp á, hvussu vit sum eitt samlað ríki skulu agera uttanríkis- og verjupolitiskt - eisini tá vit innanhýsis í ríkinum hava ymisk áhugamál. Ein avbjóðing í hesum sambandi er, at stýrisskipanarlógin ásetur virknaðin hjá Uttanlandsnevndini og somuleiðis eisini samskiftið millum uttanríkisráðharran og nevndina. Stýrisskipanarlógin ásetur bert ráðharranum at ráðføra seg við nevndina, tá ítøkiligar avgerðir skulu takast, og ikki at kunna nevndina um generel uttanríkispolitisk viðurskifti. Somuleiðis, sum áður víst, er Uttanlandsnevndin ikki umboðað eftir lutfalstalinum í løgtinginum. Hetta kann skapa eina avbjóðing, tá avgerðir skulu takast í trúnaði.

3

**Tí er triðja avbjóðingin:**
Uttanlandsnevndin, ið er skipað eftir ásetingum í stýrisskipanarlógini, er ikki gearað til at taka uttanríkis- og verjupolitiskar avgerðir. Somuleiðis er ein bygnaðarfeilur í sjálvari nevndini, tí hon lutfalsliga ikki umboðar Løgtingið.

# Hvørjar eru loysnirnar?

Hvussu førir Ríkið - Danmark, Føroyar og Grønland - saman, á bestan hátt uttanríkis- og verjupolitikk?

Vit ynskja eina skipan, har ríkispartarnir føra ein samlaðan uttanríkis- og verjupolitikk. Tó, at Føroyar í ávísum førum, sjálvar hava heimildir, tá mál eru, sum bert viðvíkja okkum. Vit ynskja ein samlaðan uttanríkis- og verjupolitikk, tí vit eru sannførd um, at londini saman, við ymiskum fortreytum og ymiskari staðseting, hava eina størri gjøgnumslagskraft, enn, at vit hvør sær føra uttanríkspolitikk. Vit eru størri og sterkari saman, tá bara vit hava røttu rammurnar og grundleggjandi somu reyðu linjur.

Fyri at hendan skipanin skal virka efter ætlan, krevur tað, at vit loysa tær omanfyrinevndu avbjóðingar. Tí uppstilla vit hesar loysnir:

## Størri uttanríkispolitiskt rásarum

Ein grundleggjandi broyting eigur at gerast í uttanríkispolitisku heimildarlógini, ið inniber eina víðkan av galdandi heimildum. Hendan víðkaða heimildin skal staðfesta, at Føroyar kunnu innlimast í altjóða felagsskapir, uttan at tað krevur viðgerð úr Danmark. Ítøkilig dømir, sum lýsa hendan trupulleikan eru t.d., tá Føroyar skuldu hava hjálandalimaskap í WTO ella fullan limaskap í Norðurlandaráðnum.

Uttanríkispolitiska heimildarlógin eigur at verða broytt soleiðis, at Føroyar hava sjálvvirkandi rætt til at gera hesar avtalur, smb. uttanríkispolitisku heimildarlógini §4, tó við tí fyriliti, at avtalurnar viðvíkja yvirtiknum málsøkjum, smb. uttanríkispolitisku heimildarlógini §1, stk. 4. Harafturat skulu Grønland og Føroyar hava sjálvstøðugan samráðingarrætt til m.a. strandalandsavtalur, um semja ikki kann røkkast Føroyar og Grønland ímillum, smb. uttanríkispolitisku heimildarlógini §1, stk. 2.

Hesar broytingar í uttanríkispolitisku heimildarlógini høvdu elvt til størri uttanríkispolitiskt rásarúm í málum, ið bert viðvíkja Føroyum, samstundis sum samráðingartilgongdin hevði verðið munandi smidligari.

**1** Broytingar í uttanríkispolitisku heimildarlógini eiga at verða gjørdar, sum geva Føroyum størri uttanríkispolitiskt rásarúm í málum, ið bert viðvíkja Føroyum.

## Búgvið avgerðargrundarlag

Nýstovnaða Samstarvsráðið er ein liður í samlaðu loysnini til avbjóðingina um, at Føroyar ikki í nóg stóran mun luttaka í samráðingum um uttanríkis- og verjupolitikk, sum viðvíkja okkum. Í fyrstu atløgu tryggjar ráðið samstarv á stjórnarstigi millum Føroyar, Grønland og Danmark. Tó eiga fastar mannagongdir at verða gjørdar fyri at tryggja, at føroysku og grønlendsku stjórnirnar verða tiknar við í hesar politisku viðgerðir.

Harumframt eiga karmar at verða gjørdir fyri uttanríkispolitiskt samstarv á parlamentariskum stigi. Hetta merkir, at allar stjórnirnar, umframt parlamentini, eru kunnað um uttanríkispolitisk viðurskifti. Hetta hevði ivaleyst borið við sær eina menning av uttanríkispolitisku tankagongdini, samstundis, sum tað hevði betrað um møguleikarnar fyri einari felags uttanríkispolitiskari mannagongd fyri Ríkisfelagsskapin.

**2** Fastar mannagongdir eiga at verða gjørdar, ið tryggja, at føroysku og grønlendsku stjórnirnar verða tiknar við í hesar politisku viðgerðir. Harumframt eiga karmar at verða gjørdir fyri uttanríkispolitiskt samstarv á parlamentariskum stigi.

## Dagførdir viðgerðarkarmar

Stýrisskipanarlógin eigur at verða broytt, soleiðis, at Uttanlandsnevndin verður umboðað eftir lutfallinum í løgtinginum. Hetta tryggjar eina fullkomna fólkaræðisliga viðgerð av uttanríkispolitiskum málum. Víðkaður trúnaður eigur somuleiðis at vera galdandi í Uttanlandsnevndini, og hon eigur einans at viðgera uttanríkispolitisk mál. Harumframt eigur ábyrgdin hjá uttanríkismálaráðharranum at verða broytt, soleiðis, at ráðharrin skal kunna Uttanlandsnevndina um, og umrøða, uttanríkispolitisk mál av stórum týdningini. Hetta fyri at tryggja, at Uttanlandsnevndin er kunnað um somu viðurskifti, sum UPN í Danmark er. Ein slík broyting grundfestir, at Uttanlandsnevndin myndar føroyska uttanríkis- og verjupolitikkin.

**3** Stýrisskipanarlógin eigur at verða broytt, soleiðis at Uttanlandsnevndin verður umboðað eftir lutfallinum í løgtinginum. Víðkaður trúnaður eigur somuleiðis at vera galdandi í Uttanlandsnevndini, eins og hon einans eigur at viðgera uttanríkispolitisk mál. Harumframt eigur ábyrgdin hjá uttanríkismálaráðharranum at verða broytt, soleiðis, at ráðharrin skal kunna Uttanlandsnevndina um uttanríkispolitisk mál av stórum týdningi fyri at tryggja, at Uttanlandsnevndin er kunnað um somu viðurskifti, sum UPN í Danmark er.

# Samanumtøka

Heimurin broytist alla tíðina, og eisini í Føroyum eru vit noydd at fylgja við í hesi menning. Globaliseringin og tøkniliga menningin hevur gjørt heimin minni, og ger tað alsamt lættari og smidligari hjá okkum at samstarva við umheimin - men samstundis hevur hetta eisini ført nýggjar avbjóðingar við sær. Søguliga hevur Ríkisfelagsskapurin ment seg nógv og hevur megnað at tilpassa seg samtíðina. Vit hava fingið alsamt fleiri uttanríkispolitiskar heimildir, so hvørt sum tørvurin ella ynskið hevur verið til tess frá føroyskari síðu.

Vaksandi áhugin fyri Arktis ger Føroyar, sum partur av arktiska økinum, til ein potentiellan viðspælara hjá stórveldunum, sum ynskja ein fót inn í Arktis. Spenningurin í Arktis og kapprenningin millum stórveldini er ein avbjóðandi støða í mun til, hvussu Ríkið - Danmark, Føroyar og Grønland - saman, á bestan hátt skal føra uttanríkis- og verjupolitikk. Nýggja støðan setur veruliga Føroyar á tað geopolitiska heimskortið, og tað er ein sannroynd, at heimsins stórveldi venda sær til okkum, tí vit geopolitiskt eru vorðnar meira áhugaverdar.

Hetta økta uppmerksemi á Føroyar krevur rættar og tíðarhóskandi karmar. Tað hevur í longri tíð, við skiftandi stjórnum, verið eitt ynski frá føroyskari síðu at fingið eitt størri uttanríkispolitiskt rásarúm. Samstundis sæst ein vælvilji frá danskari síðu at útvega Føroyum størri uttanríkispolitiskt rásarúm, og at hava Føroyar við í avgerðum, ið skulu takast. Hetta sæst m.a. í málinum um Kapacitetspakkan og stovnsetanina av Samstarvsráðnum. Í hesi tilgongdini er av størsta týdningi, at Føroyar byrja at taka sokallaðar uttanríkispolitiskar búnar avgerðir, har Vesturheimurin - ES og NATO - eru okkara stavnhald.




Mynd: DIIS, Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis.
https://www.diis.dk/publikationer/nye-sikkerhedspolitiske-dynamikker-arktis



Uppritið hevur lýst tríggjar grundleggjandi avbjóðingar í núverandi skipan.

**1.** Manglandi heimild í uttanríkispolitisku heimildarlógini, ið skal geva Føroyum størri uttanríkispolitiskt rásarúm, tá tað bara viðvíkir okkum.

**2.** Føroyskir myndugleikar verða ikki fult ella nóg tíðliga tiknir við í uttanríkis- og verjupolitiskar avgerðir.

**3.** Uttanlandsnevndin, ið er skipað eftir ásetingum í stýrisskipanarlógini, er ikki gearað til at taka uttanríkis- og verjupolitiskar avgerðir. Somuleiðis er ein bygnaðarfeilur í sjálvari nevndini, tí hon lutfalsliga ikki umboðar Løgtingið.

Loysnin upp á hesar avbjóðingar er ein skipan, har Ríkið, samlað, førir uttanríkis- og verjupolitikk.

**1.** Broytingar í uttanríkispolitisku heimildarlógini eiga at verða gjørdar, sum geva Føroyum størri uttanríkispolitiskt rásarúm í málum, ið bert viðvíkja Føroyum.

**2.** Fastar mannagongdir eiga at verða gjørdar, ið tryggja, at føroysku og grønlendsku stjórnirnar verða tiknar við í hesar politisku viðgerðir. Harumframt eiga karmar at verða gjørdir fyri uttanríkispolitiskt samstarv á parlamentariskum stigi.

**3.** Stýrisskipanarlógin eigur at verða broytt, soleiðis at Uttanlandsnevndin verður umboðað eftir lutfallinum í løgtinginum. Víðkaður trúnaður eigur somuleiðis at vera galdandi í Uttanlandsnevndini, eins og hon einans eigur at viðgera uttanríkispolitisk mál. Harumframt eigur ábyrgdin hjá uttanríkismálaráðharranum at verða broytt, soleiðis, at ráðharrin skal kunna Uttanlandsnevndina um uttanríkispolitisk mál av stórum týdningi fyri at tryggja, at Uttanlandsnevndin er kunnað um somu viðurskifti, sum UPN í Danmark er.

Hesar broytingar høvdu ivaleyst borið við sær eina menning av uttanríkispolitisku tankagongdini, samstundis, sum tað hevði betrað um møguleikarnar fyri einari felags uttanríkispolitiskari mannagongd fyri Ríkisfelagsskapin. Vit ynskja ein samlaðan uttanríkis- og verjupolitikk, tí vit eru sannførd um, at londini saman, við ymiskum fortreytum og ymiskari staðseting, hava eina størri gjøgnumslagskraft, enn um vit hvør sær føra uttanríkspolitikk.

Vit eru størri og sterkari saman, tá bara vit hava tær røttu rammurnar og grundleggjandi somu reyðu linjur.

# Keldur

**DIIS, Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis.** (2020)
https://www.diis.dk/publikationer/nye-sikkerhedspolitiske-dynamikker-arktis

**Forsvarsministeriets fremtidige opgaveløsning i Arktis** (2016).
Leinkja: https://www.ft.dk/samling/20151/almdel/FOU/bilag/151/1650324.pdf?fb-clid=IwAR0FYACXE3a8AYjF6-TVREQX1yrmyFM_q9vZdfiVm5dDBrKpwh7HgmufJRc

**Grundloven.** Lov nr. 169 af 05/06/1953.
Leinkja: https://www.retsinformation.dk/eli/lta/1953/169

**Heimastýrislógin.** Lov nr. 11 af 31. mars 1948 om Færøernes Hjemmestyre.
Leinkja: https://logir.fo/Kunngerd/11-af-31-03-1948-af-Lov-om-Faeroernes-Hjemmestyre

**Lov om det Udenrigspolitiske Nævn.** Lov nr. 54 af 05/03/1954.
Leinkja: https://www.retsinformation.dk/eli/accn/A19540005430

**Samstarvsráðið:** kommissorium-for-usfp-kontaktudvalg.pdf (stm.dk)

**Stýrisskipanarlógin.**
Leinkja: https://www.logting.fo/um-logtingid/hvussu-arbeidir-tingid/styrisskipanarlogin/

Sølvará, H.A. (2020). **100 Danmarkshistorier: Færøerne efter freden.** Aarhus Universitetsforlag

Sølvará, H.A. (2002). **Løgtingið 150.** Løgtingið

**Uttanríkispolitiska heimildarlógin.** Løgtingslóg nr. 80 frá 14. mai 2005 um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera.
Leinkja: https://logir.fo/Logtingslog/80-fra-14-05-2005-um-altjodaraettarligu-sattma-lar-Foroya-landsstyris-at-gera

saft@ft.dk

www.saft.fo

Sambandsflokkurin á Fólkatingi